## KÍ-profilur til EB/Streym

Tað er nógvur aktivitetur í EB/Streymi um dagarnar. Felagið boðar í dag frá, at sáttmáli er gjørdur við Kristoffur Jacobsen hjá KÍ. Hóast bara 21 ára gamal, so hevur Kristoffur Jacobsen verið ein av lyklaleikarunum hjá KÍ seinnu árini. Hann er fastur maður á U21-landsliðnum og hevur eisini verið inni kring landsliðshitan, tá Jógvan Martin Olsen sendi boð eftir honum. Sambært heimasíðuni hjá EB/Streymi er talan um sáttmála fyri kappingarárið 2010. Fyrr í dag boðaði EB/Streymur umvegis heimasíðu sína eisini frá, at felagið hevði longt sáttmálan við Gudmund Nielsen, soleiðis at hann eisini verður í EB/Streymi í 2010.



## Níggju mál í níggju minuttir

Brasilska fótbóltssambandið kannar nú, um talan var um avtalað spæl, tá Viana við einum 11-0 sigri á Chapadinha vann sær uppflyting. Viana skuldi vinna dystin við 11 málum, men níggju minuttir undan leikloki stóð bara 2-0 á talvuni. So kom annars gongd á, og við níggju málum seinastu minuttirnar gjørdist sigurin júst nóg stórur. Nú verður tó kannað, um hetta gekk fyri seg eftir bókini, ella um talan hesa seinastu løtuna var um avtalað spæl millum partarnar.

### Neistin-VÍF 35-24 (22-13):

# Eingin ivi á Hálsi

**Útfallini í dystinum vóru ov stór hjá VÍF, sum upp á bara 10 minuttir misti alt á gólvið í dystinum móti Neistanum**




Jákup Mørk

Sum nýtt og ikki minst blaðungt lið í Sunset-deildini hevur VÍF havt sínar trupulleikar higartil.

Í løtum hevur liðið annars víst, at tær hava kvalitetir til at gera um seg í deildini, men botnstøðið hevur verið alt ov lágt, og tað hevur kostað dýrt í teimum dystum, sum eru spældir.

Og tað gjørdi tað eisini sunnudagin. Byrjanin av dystinum móti Neistanum gekk annars hampuliga javnt fyri seg, men tá VÍF um miðjan fyrra hálvleik misti konsentratiónina eina løtu, skramblaði korthúsið fullkomuliga. Ikki minst, tí Neistin í Katrin á Neystabø hevur ein spælara, sum støðugt nýtur høvdið í tí, sum hon ger, og sum tí var til reiðar at gera sær dælt, tá VÍF gav Neistanum møguleikan.

Stóri munurin, sum kom í av hesum, punkteraði fullkomuliga allan spenning í dystinum. Neistin læt ongan tíð tryggu leiðsluna gleppa sær av hondum, og í løtum prógvaði liðið eisini, at tær hava eitt lið, sum kann arga tey ovastu, hóast tað verður trupult at halda dampinum somikið høgt, at tær eisini fara at kappast um finalupláss.

Hjá VÍF gjørdi tað ikki dagin betri, tá Viviann Petersen fekk eitt heldur bíligt reytt kort, tá hon kom út úr málinum at steðga kontra-álopi frá Neistanum. Og tí mugu vestmannakvinnur vera evnaríka málverjan fyriuttan, tá tær spæla næsta dystin.

Fyrst og fremst skulu tær tó læra at hækka botnstøðið. Ein styrkur er tað í so máta, at Durita Christophersen eina løtu hevur frívakt av sjónum, so hon kann gera um seg á vøllinum, men enn er venjingarstøðan hjá henni tó ikki nóg góð til at halda ein heilan dyst.



Anja Heinadóttir og liðfelagarnir í Neistanum høvdu ikki stórvegis trupulleikar av VÍF, sum enn eigur fyrstu stigin í Sunset-kappingini í vetur til góðar

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

**VÍF-Neistin 35-24 (22-13):**
**10 min:** 7-5
**20 min:** 17-8
**40 min:** 26-18
**50 min:** 30-21
**Málskjúttar**
**Neistin:** Katrin á Neystabø 10(2), Jacklin Durhuus 6, Birita Wardum 5, Anja Heinadóttir 4, Lina Andriulyte 3, Anna Clementsen 3, Unnur Danielsen 2, Rakul Augustinussen 2
**VÍF:** Liljan Djurhuus 7(2), Durita Christophersen 5, Halla Midjord 3, Heidi Joensen 3, Rannvá á Rógvu 2, Agnas Olsen 2, Rakul Joensen 1, Linda Davidsen 1
**Brotskøst:** Neistin 3, VÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 3, VÍF 2
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Sámal Paulason & Dánjal Hansen

### Stjørnan-StÍF 33-20 (15-10):

# Stórsigur til Stjørnuna

**StÍF fekk ikki gjørt tað minsta pettið við Stjørnuna, sum aftur staðfesti, at tær vilja vera við í oddinum**




Jákup Mørk

Hóast StÍF hevur styrkt sær um liðið við útlendskum profilum í ár, so tykist tað enn vera nakað eftir, áðrenn tær eru í nær námind oddaliðunum í deildini.

Tað var staðfestingin í Klaksvík sunnudagin, har Stjørnan snøgt sagt vant burtur úr StÍF.

Frá byrjan hevði Stjørnan eitt botntrekk, sum var nakrar nanometrar yvir tí hjá StÍF, og seigleikan í hesum fingu gestirnir ongan tíð bilbukt við.

Stjørnan togaði seg støðugt longur og longur frá mótstøðuni, sum sjáldan fann nakað vápn ímóti sterku verjuni og hart skjótandi bakketuni hjá klaksvíkarkvinnunum, og sum dysturin leið, var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Enn er kappingin sjálvandi ung, men avrikini hjá Stjørnuni og Tjaldri hava mest sum staðfest, at kappingin í ár aftur verður ein kapprenning millum tey bæði liðini. Her og nú ræður tó fyrst og fremst um at halda momentinum uppi, soleiðis at finaluplássið kann tryggast, og so fæst at síggja, hvussu úrtøkan verður til ta tíð.

Hjá StÍF tykist talan her og nú vera um at finna rætta lagið á liðnum, soleiðis at tær eisini kunnu spæla við um heiðursmerkini, har tað fyrst og fremst er Neistin, sum kappast skal við.

### FAKTA

**Stjørnan-StÍF 33-20 (15-10)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 10-8
**40 min:** 18-13
**50 min:** 22-16
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 8(2), Valentina Suciu 7(2), Durita Mikkelsen 5, Edith Hansen 5, Annika Ljósstein 3, Joan Midjord Djordjevic 3, Hanna Mikkelsen 1, Una Olsen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 5, Bára Berthelsen 4, Rósa Danielsen 3, Roxana Bodirlau 3(1), Fríðrunn Danielsen 2, Annika L. Petersen 2, Bobra Adriana 1
**Brotskøst:** Stjørnan 5, StÍF 2
**Útvísingar:** Stjørnan 3, StÍF 4
**Dómarar:** Birgir Sondum & Hanus Kúrberg